## Balling skiftir til Næstved

Tað kundi næstan verið í Runavík, at fyrrverandi NSÍ-spælarin Ulrik Balling skrivaði undir nýggjan sáttmála, tí Faxe Kondi sodavatn stóð á borðinum, men tað var í Næstved. 33 ára gamli álopsspælarin flytur sostatt ikki við Vejle upp í superliguna, men fer ístaðin at spæla fyri 1. deildarliðið Næstved. Balling hevur áður spælt í Næstved, og tá var hann toppskjútti hjá felagnum, og í Næstved fegnast tey um, at hava fingið spælaran aftur til felagið. Sáttmálin millum Balling og Næstved er galdandi í tvey ár.




## Steypagrilling og tikarar

White Tigers, sum er viðhaldsfelagið hjá B36, ætla veruliga at gera nakað burtur úr degnum, nú steypafinala skal spælast. Telt verður sett upp millum tey bæði felagshúsini í Gundadali, og í hesum ber so til at keypa sær mat beinleiðis av grillini. Eisini verður skipað fyri andlitsmáling, og fer handan fram í ungdómshølunum hjá B36, har skreytutir av ymsum slag sjálvandi eisini kunnu keypast.

## Kroatia klárt til fjórðingsfinaluna

**Kroatia er sum fyrsta land klárt til EM-fjórðings-finaluna, eftir at teir í gjár heldur óvæntað vunnu 2-1 á Týsklandi**

FÓTBÓLTUR
*Pætur Albinus*
*patur@sosialurin.fo*

Eftir frálíkt avrik í fyrsta dystinum ímóti Póllandi, skuldi álopsparturin hjá Týsklandi veruliga standa sína roynd, tá ið teir í gjør møttu stinnu kroatisku verjuni. Hetta var topp-dystur í bólki B, og nógv var væntað av dystinum.

Verjuparturin sveik

Týska verjan er av nógvum mett sum veiki liðurin á liðnum, og tað var júst týska verjan, ið gav Kroatia leiðsluna. Hon var alt ov passiv, tá ið innlegg kom úr vinstru, og so slapp Darijo Srna ótarnaður at leggja Kroatia á odda 1-0.

Eftir at hava sitið á tí mesta fyrru løtuna í seinna hálvleiki, eydn-aðist tað Kroatia at økja um leiðsluna. Hetta var eitt heldur heppið mál, har Ivica Olić kom at standa púra fríur framm-anfyri týska málinum.

Týskland kom síðstu løtuna betur við í dystin, og teir fingu eisini mink-að um munin. Við sínum triðja máli var tað Lukas Podolski, sum gjørdi støðuna til 2-1. Týskland kom ikki tættari enn hetta, og í síðstu løtu settu teir eitt gott punktum á vánaliga avrikið, tá ið inn-skifti Bastian Schweints-teiger fekk reytt fyri at hava sligið ein kroatiskan leikara.

### Eysturríki hjálpti

Eftir dystin vóru kroatisku leikararnir fegnir um, at teir so gott sum høvdu leikt seg víðari úr bólka-spælinum. Seinni um kvøldið skuldi tað tó vísa seg, at Eysturríki kom teimum til hjálpar. Við at javna í yvirtíðini tryggjaði Eysturríki sær eina stigið ímóti Póllandi, og í sama viðfangi tryggjaði hetta Kroatia pláss í fjórðings-finaluni. Kroatia er har-við fyrsta land í fjórðings-finaluni, og seinasti dyst-ur teirra í bólkaspælinum, sum skal spælast ímóti Eysturríki, hevur ongan týdning. Kroatia er undir øllum umstøðum vinnari av bólkinum, og spenn-andi verður nú bara at síggja, hvørjum teir skulu møta.




*Dario Srna hevur skorað, og so er Kroatia ávegis EM-fjórðingsfinaluni, meðan Týskland skal stríðast móti Eysturríki um sítt pláss*

*Mynd: Polfoto/AP*

# Steypið fer í B36 húsið

**Tað er ongantíð endað málleyst í steypafinalunum, har tað í miðal eru skorað fleiri enn fýra mál í teimum 63 finaludystunum, sum hava verið spældir síðani 1955**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Líkamikið hvussu leikur fer, so fær B36 løgmanssteypið til ognar hesaferð. Spurningurin er so, um navnið hjá EB/Streymi verður graverað eina ella tvær ferðir á steypið*

Tað er lagt upp til ógvuliga spennandi finalu, tá ið EB/Streymur og B36 tørna saman á ovara vølli í Gundadali í annað kvøld.

Kappingin frá EM enda-spælinum er stór, men tað er neyvan nógv við síðuna av at rokna við, at valið hjá viðhaldsfólkunum hjá EB/Streymi og B36 verður lætt.

Og tað er lítið at ivast í, at tey, sum í morgin fara at leita sær í Gundadali, fara at vera vitni til, at mál fara at verða skorað. Um tað verður málleyst, so verður talan um heilt øðrvísi final-ur enn tær, sum higartil hava verið spældar.

Fyrsta steypafinalan var í 1955. Síðani hava 63 finalu-dystir verið á skránni. Saml-aða máltalið er 256. Tað vil siga, at tað í miðal eru skorað 4,1 mál í hvørjum finaludysti.

Hagtølini siga, at tað verða skorað mál í øllum finaluuppgerðum. Higartil er tað ongantíð komið fyri, at ein finala hevur verið málleys.

Størsta sigurin eigur HB. Sigurin varð vunnin í 1971, tá ið TB legði rygg til 9-0 avsmurning. HB eigur næstan eins nógvar finalu-sigrar sum hini liðini eiga tilsaman. HB hevur vunnið 26 ferðir.

Átta onnur feløg hava staðið við Ísafjarðarbikari-num, Ísafjarðarsúluni og Løgmanssteypum. Tey eru TB (6), GÍ (6), KÍ (5), B36 (5), NSÍ (2), VB (1), B71 (1) og EB/Streymur (1).

HB hevur vunnið eitt Ísafjarðarbikar, tríggjar Ísa-fjarðarsúlur og eitt Løg-manssteyp til ognar.

Í ár eru B36 og EB/Streymur í finaluni. Talan er um søguliga finalu á tann hátt, at tað er fyrsta ferðin, at B36 og EB/Streymur hittast í finaluni. Í fjør var EB/Streymur fyri fyrstu ferð í finaluni, sum saman-settaliðið vann ímóti HB.

### Á B36 hillina

Tá ið teir í árstalsfelagnum og teir í samansetta liðnum í Sundalagnum í morgin fara at standa yvir av hvørjum øðrum, so verður tað fyrst og fremst heiður og æra, sum fara at standa upp á spæl. Akkurát sum tað altíð er tað hjá fót-bóltsspælarum – ikki minst í einari steypafinalu.

Vinnarin fer at tryggja sær rætt at luttaka í Europa Cup á sumri í 2009. Tað hevur sjálvandi stóran týdn-ing. Og so er tað Løgmans-steypið. Teir í EB/Streymi fingu tað handað eftir dramatiska steypasingurin á HB.

Fagnaðurin verður neyvan minni, um tað í morgin fer at eydnast EB/Streymi at vinna og tað harvið verður liðformaðurin hjá teimum, Egil á Bø, sum fer at fáa steypið handað frá løg-manni. Men tað er longu nú greitt, at steypið hevur kós í B36 húsið, har tað fer at standa í framtíðini.

Søgan er tann, at hetta er 10. árið, at tað verður spælt um hetta steypið. Áseting-arnar siga, at tað skal spælast um steypið í tíggju ár. Tað felagið, sum tá hevur vunnið tað fleiri ferðir enn nakað annað felag, vinnur steypið til ognar.

Higartil hevur B36 vunn-ið steypið tríggjar ferðir, GÍ tvær ferðir, og KÍ, NSÍ og HB eina ferð í part. Einasti møguleiki fyri, at kappingin ikki skuldi verða avgjørd í ár, var, at GÍ vann kapp-ingina í ár. So hevði verið neyðugt at kappast í hvussu so er eitt ár afturat.

20. mars tapti Víkingur, sum hevur yvirtikið sessin hjá GÍ, í áttandaparts finaluni 5-3 í Sørvági ímóti 07 Vestur. Harvið varð greitt, at tað ikki fer at bera øðrum felag enn B36 til at vinna Løgmanssteypið til ognar.

Hetta er fyrsta steypið, sum tað síðani 1955 hevur verið kappast um, sum HB ikki vinnur til ognar. Í ann-að kvøld fæst at síggja, um onkur onnur steypatradition eisini fer at verða brotin. Ein møguleiki er, at eingi mál verða skorað í vanligu leiktíðini. Men tað man vera lítil sannlíki fyri tí.